TING-HELLAN

# Tað er neyðugt at allir partar lora

Semja eigur at verða um skipan, sum ber møguleika fyri fullveldi í sær, men um henda semjan skal gerast til veruleika, so er neyðugt at semjast um, at vegurin til fullveldið ikki skal vera heilt uttan forðingar. Hetta verður roknað sum møguleiki fyri tjóðskaparligari semju í stjórnarskipanarmálinum, men trapputingið mánakvøldið vísti, at tað framvegis verður neyðugt at mýkja støðuna ikki so lítið, áðrenn flokkarnir fara at semjast

**TRAPPUTING UM STJÓRNARSKIPANINA**
*Jóannes Hansen*

Hvørjir møguleikar eru fyri heilt breiðari politiskari undirtøku fyri greinunum í nýggju stjórnarskipaninivið orðingum um støðuna hjá Føroyum? Ikki minst tá ið tað ræður um viðurskiftini við Danmark og yvirhøvur í altjóða samfelagnum, og hvussu Føroyar og føroyingar kunnu vera við til at broyta støðuna.

Hetta var dagsskráin, og tað var hetta, sum var umrøtt í lívligum orðaskifti millum politikarar og fundarluttakarar, tá ið tað mánakvøldið var skipað fyri Trapputingi í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Formenninir fyri teir fýra stóru flokkarnar vóru bjóðaðir at taka lut í orðaskifti. Frammanundan hevði Fólkaflokkurin boðað frá, at teirra formaður fór ikki at møta. Í staðin ætlaðist Poul Michelsen, løgtingsmaður og limur í stjórnarskipanarnevndini at møta. Hann fekk forfall mánadagin, tí var einki umboð fyri Fólkaflokkin við í orðaskiftinum.

Kaj Leo Johannesen, Høgni Hoydal og Jóannes Eidesgaard lýstu síni sjónarmið, og einir 40-50 fundarluttakarar vóru góðir sparringspartnarar. Fleiri av spurningunum, sum vóru umrøddir, eru svaraðir í fakta kassunum, sum standa saman við hesi greinini.

Hugburðurin var konstruktivur, og politikararnir royndu at vera framrættaðir. Men tað tóktist vera teimum týdningarmikið so at siga at kálka vøllin og harvið at undirstrika, hvussu teirra støða er øðrvísi, enn hon er hjá hinum flokkunum.

Semjan millum sambandsmannin, tjóðveldismannin og javnaðarmannin var felags fatan av, at Føroyar eru land, at føroyingar eru tjóð, og at evsta valdið í og yvir Føroyum er hjá fólkinum, sum býr í hesum landinum.

Men kortini vóru natúrligu avleiðingarnar av semjuni rættuliga ymiskar hjá teimum trimum floksformonnunum.

## Eingin fær alt

Saman við politikarunum var Kári á Rógvi. Hann hevur seinastu nógvu árini fingist við grundlógararbeiði og stjórnarskipanir. Fyrstu árini var hann skrivari í grundlógarnevndini. Nú er hann næstformaður í stjórnarskipanarnevndini. Kári skrivar í løtuni Ph. D. á lærda háskúlanum í Reykjavík um grundlógir og stjórnarskipanir.

Kári hevði onga framløgu mánakvøldið. Men hann luttók í orðaskiftinum, og hann gav eitt nú til kennar, hvussu hann heldur, at politikararnir eiga at finna saman um tjóðskaparligu semjuna í stjórnarskipanararbeiðnum.

– Í politikki er tað soleiðis, at eingin skal rokna við at fáa alt. Loysingarmenn og sambandsmenn mugu finna saman um eina loysn, sum teir vita, at føroyingar kenna seg tryggar við. Málið eigur at vera, at nevndin semist um eina stjórnarskipan, sum loysir verandi stýrisskipan av og verður samtykt eftir broytingarreglunum í galdandi stýrisskipanarlóg og eisini á fólkaatkvøðu. Í uppskotinum um nýggja stjórnarskipan er mannagongd uppskotin, sum leggur upp til, at møgulig broyting í ríkisrættarligu viðurskiftunum hjá Føroyum skulu samtykkjast á serligan hátt. Tilmælið er, at sovornar broytingar skulu samtykkjast í Løgtinginum við vanligum meiriluta, síðani á fólkaatkvøðu við vanligum meiriluta. Millum hesar báðar samtyktirnar – í Løgtinginum og á fólkaatkvøðu – eigur at vera umhugsunartíð upp á eitt ár, segði Kári á Rógvi.

## Umvæla

Kaj Leo Johannesen segði seg síggja arbeiðið við stjórnarskipanini sum møguleiki at umvæla stýrisskipanarlógina, sum nú er meiri enn tíggju ára gomul. Royndirnar eiga at bera við sær góðar fyritreytir fyri skilagóðari innrætting av stýrisskipanarlógini. Sambandsflokkurin sær ikki hesa lógina sum grundlóg. Sambandsflokkurin staðfestir, at Føroyar eru undir donsku grundlógini, og at tað framvegis ikki er undirtøka millum føroysku veljararnar at Føroyar skulu hava sína egnu grundlóg.

Sambandsflokkurin hevur einki ímóti, at tað í arbeiðnum verður umrøtt og ásett, hvussu mannagongdirnar móti fullveldinum skulu vera. Eingin skal tó ivast í, at Sambandsflokkurin ikki fer at arbeiða fyri, at Føroyøar skulu gerast fullveldi og harvið, at stjórnarskipanin ella stýrisskipanarlógin skal verða grundlóg. Ríkisfelags-

*Framhald á næstu síðu*

## HVAT ER STJÓRNARSKIPAN?

Tey skjøl ella siðvenjur, ið áseta, hvørjir stovnar, hvørjar mannagongdir og hvørji rættindi skulu vera í politiskari skipan kunnu sigast at vera stjórnarskipanir.

Í Føroyum hava vit stýrisskipanarlógina. Hon kom í 1994 í staðin fyri stýrisskipanarlógina og lóg um umboðsvald Føroya frá 1948. Undir krígnum høvdu vit fyribils stýrisskipan, og áðrenn kríggið var sonevnda løgtingslógin (samtykt á fólkatingi) stýrisskipan. Løgtingið er stovnað í 800-árinum (ella fyrr) og varð upprunaliga helst skipað eftir siðvenju ella stuttum viðtøkum.

Føroyar hava sostatt altíð havt stjórnarskipan, men ikki nakað einstakt fullfíggjað stjórnarskipanarligt skjal.

Stýrisskipanarlógin lýsir týðandi stovnar, vald og mannagongdir teirra. Stýrisskipanarlógin er 'grundlóg' Føroya í yvirtiknum málum.

Føroyar eru knýttar at danska ríkinum við síni grundlóg, og onkustaðni ímillum grundlóg og stýrisskipanarlóg er heimastýrisskipanin lýst í heimastýrislógini og øðrum skjølum, ið samtykt eru bæði á løgtingi og á fólkatingi. Harumframt hava vit samtykt at gera eftir europeiska mannarættingarsáttmálanum (EMRS), ið eisini hevur dám av stjórnarskipan.

Flestu fólk í heiminum liva undir fleiri stjórnarskipanum ella grundlógum í senn. Býrt tú í býnum Flensburg, so ert bæði undir 'forfatningini' hjá landinum Schleswig-Holstein, 'grundlógini' hjá Týska Samveldinum, og undir 'stjórnarskipanini' (ásett í sáttmála) hjá ES, umframt EMRS.

Summastaðni brúka tey ymisk orð um ymsu skjølini, meðan aðrastaðni brúka tey sama orðið. Til dømis eita stjórnarskipanarskjølini hjá amerikansku statunum 'Constitution,' ið er sama orðið sum samveldið brúkar um sítt grundlógarskjal.

Í samveldum er ofta álagt dómstólunum at døma um stríð kemur í ímillum ymsu skipanirnar. Danmark er júst dømt fyri ikki at hava fylgt EMRS og má tí broyta sína lóg. Føroyar og Danmark avráddu í 1948 at serligur stovnur við umboðum fyri londini bæði og við dómarum úr hægstarætti skuldi døma, um stríð gjørdist um okkara samveldisskipan. Henda áseting í heimastýrislógini er ongantíð vorðin brúkt, helst bæði tí at danir hava givið seg í mongum málum, men eisini tí skrivstovan hjá løgtinginum steðgar uppskotum, ið møguliga – møguliga ikki – kundu havt ført til donsk mótmæli og sloppið at staðið sína roynd í hesum stovni.

